

*Hans Andrias (Djurhuus) og pápi (Djóni í Geil) við ovastu krógv "í Lánni". Vegurin var ikki gjørdur tá, men nú liggur krógvin tætt við vegin (Hoyvíksveg) høgrumegin, tá ein gongur niðan eftir*

Boerne bliver tvungne til vige for Overmagten, men først efter en langvarig og heltemodig Modstand. Den ene Dag, 30te November stod Kampen ved Overgangen over en af de mange Floder, som gennemstrømmer Landet. Boerne havde sprængt en Jernbanebro, der førte over Floden, i Luften for at hindre Englænderne Overgangen, og de to Modstandere vedblev i hele 10 timer at overdænge hinanden med Kugler og Granater. Til sidst lykkedes det en Del af den engelske Hær at slippe over Floden paa et Sted, hvor der var opført en Mølledæmning, hvorefter Boerne trak sig tilbage.

Da Boerne ere fortrinlige Skytter, har Englænderne lidt store Tab i de her omhandlede Kampe, og navnlig er det gaaet ud over Officererne, der er let kendelige paa deres uniformer, og hvem det jo særlig gælder om at ramme, da deres Fald let kan føre til Modløshed for de Korps, som tabe dem, som skulle føre an i Kampen.

## Poul Sloan kemur heim at ferðast

**1.** Juledag. I dag ankom Kanonbaaden Guldborgsund fra Suderø. Med den kom min Fætter Poul Sloan, som kom fra Leith med Vesta, der nu ligger i Trangisvaag. Guldborgsund havde Vestas Post til Thorshavn med, thi Vesta kommer vistnok ikke førend i Morgen Aften. Jeg blev saa gnaven, da jeg saa Guldborgsund komme "undan Næsset", thi jeg ønskede kun at Vestas skulde komme. Saa gik jeg ind at spise Middag, en dejlig Kalvesteg, som Mor havde tillavet i Dagens Anledning. Jeg havde udmærket Appetit og spiste mig rigtigt mæt. Da jeg saa var færdig, satte jeg mig til at se paa Billederne i Den danske Stat. Medens jeg nu sidder og fornøjer mig over de nydelige Billeder, lukker bror Poul Stuedøren op og raaber til mig og de andre, som er inde i Stuen, om vi ikke kom til at hilse paa Søskendebarnet. Jeg anede straks hvem det var, og jeg var ikke sen ud i Køkkenet, hvor jeg vekslede hjertelige Haandtryk med min kære Fætter og Ven Poul Sloan. Med krigen gaar det paa samme maade.

En færing, en Mand fra Sørvaag, som er bosiddende i Johannesburg, er Officer i Boerhæren. (Tað kundi verið áhugavert um nakar veit meira um hendan mannin.) I 1896, da Dr. Jameson gjorde Indfaldet der nede, var han med Boerne, og nu har han atter taget Mundering paa og er en meget rask mand.

2. juledag. Kom Postdampskibet Vesta fra København (Via Leith og Trangisvaag).

Det er Nytaarsaften! Skud paa Skud høres udenfor. Det er det gamle Aar som skal bort for aldrig at komme igen. Nu ringer Kirkeklokkerne. Den 11. Time er kommet, og Klokken nærmer sig mere og mere 12. Nu er det det sidste Minut, Klokken slaar 12 og – et Skud, er vældigt Brag og 1899 er ikke mere.

*Thorshavn, Nytaarsnat 1899*
*Peter Isaksen*

## Myndir í seinasta parti

Vit hava frá Johan Restorff fingið hesar frágreiðingar til tvær av myndunum í 2. parti av dagbókini fyri 1899.

**Á síðu 20 er mynd, har teksturin sigur: Flutningur í Havn.**
Myndin er tikin av gøtuni sum gekk frá Áarvegi niðan á Húsabrúgv, millum húsini hjá "Jørgen", har Centrum og seinri Marstein fluttu inn.

Gøtan bar navn eftir fyrsta heiðursborgara í Havn M.C. Restorff, men av ókendum grundum er gøtunavnið strikað mitt í 60-unum, uttan at onnur gøta í gomlu Havnini hevur "arvað" navnið. Vit munnu vera fleiri, sum halda hetta vera løgið.

Húsini til høgru eru húsini hjá "gamla Restorff", M.C.Restorff. Longur uppi í høgru síðu eru húsini hjá "Bøkjaranum", seinri M.A.Jacobsen, og ovast til høgru eru húsini hjá "Hósvíks-Jáki", og tey standa enn ídag.

Til vinstru, omanfyri húsin hjá Jørgen standa húsini, har Addaba búði við familju sínari og aftast í myndini eru gomul hús, sum eru tikin burtur seinast í 50-unum. Har búðu Rubeksen systkini, sum vóru deyv. Býráðið fekk húsini, meðan húsfólkið fekk bústað á Ellisheiminum lívstíð teirra.

**Á síðu 18 er mynd, har teksturin sigur: Á Vestaruvág. Kennir nakar hetta skip?**
Lítil ivi man vera um, at hettar er skonnartin: Frederiksvaag. Hon gekk burtur við Læsø í 1913.

M.C.Restorff´s handil/reiðarí átti skipið, og í mong ár førdi abbi okkara, Johan Martin Restorff, Frederiksvaag, til hann í 1904 legðist uppi og giftust Johanne Frederikke Dahl Christiansen, dóttir navnframa Christian í Dali ( ein av Dala-brøðrunum) - kallaður " Loðsurin" Johan M. Rerstorff var millum manna kallaður "Kaptejnurin".

## 1924: Hin fyrsti flúgvarin

Millum nógv av tí, sum Petur Alberg skrivaði um í sínum seinni dagbókum var eisini um, tá ið fyrsti flúgvari kom til Føroyar. Vit endurgeva hesa áhugaverdu frágreiðing

Fríggjakvøld, 15 august um kl. 6-7 varð øll Havnin skrædd upp úr tí dagliga "svøvninum" við, at ein flúgvari kom sunnanfrá, gjørdi eitt sving niður við Strond og fleyg so oman aftur og setti seg á sjógvin uttanfyri Tinganes. Hetta var Locatelli, italienarin, sum vit vitstu um var í Orknoyunum og tvær reisir um dagin fekk "veðurmelding" úr Føroyum, men eingin hevði trúð tí, at hann fór at koma higar. Men nú lá hann altso fortoyaður við boyuna uttanfyri Skinnarasker.

Hvør fjøl í Havnini bleiv drigin í sjógvin og fyllt var við fólki, so nógv sum rúmaðist, og Locatelli var "umringaður" av undrandi Havnarfólki. Hann hevði flogið frá Stromnes í 2 tímar og 10 minuttir. Eitt ævintýr fyri okkum, sum eru so mikið gomul, at vit minnast, tá André, Strindberg og Frankel fóru til Norðpólin í luftballón! Teir spurdust ikki aftur, sjálvsagt. Tað var 1898. Og nú í 1924 flúgva teir verðina runt!

Locatelli og hansara 3 fylgisveinar gistu í Havn hesa nátt úti á Tinganesi á Nicodemussens pensionati, og leygarmorgun 16 august fóru teir til Íslands.

Hópur av Havnarfólki var á fótum úti í Grimið á Øskudunga í Skinnaraskeri (har var eg staddur), úti á Tinganesi, á Skansaveg og aðrastaðni. Johanna og børnini vóru í kvistavindeygunum. (Kl. var um 9). Fyrst lá hann og sigldi eitt sindur aftur og fram út móti Sandagerðsvík. So út við Argjalandið, og so setti hann meira og meira ferð á, og dunið frá motorinum og báðum propellunum var óført. So lætti hann sær upp frá heima móti Geilini og smoygdi sær so vakurt upp um, og nakrar minuttir aftaná var hann horvin aftanfyri Reynið. Eitt korter aftaná "passeraði" hann Mykines og umleið 3 tímar seinri var hann í Íslandi. Eitt ævintýr.



*Poul bróður. Djóni mín. 1922*

**Næstu ferð**
Tær komandi tríggjar Miðvikurnar kom at snúgva seg um Daniel J. Danielsen (1871-1916). Hetta verður ein av teimum mest forkunnugu frásagnunum, sum vit hava havt. Tað heilt serliga við Daniel var, at hann var trúboðari í Congo 1901-1903. Hetta vita nógv, men vit fara at greiða frá teimum sera dramatisku umstøðum, sum hann virkaði undir við einum harðræði, sum skakaði allan heimin, tá ið hetta kom fram alment. Júst í hesum átti Daniel sín leiklut. Vit hava gjørt eitt stórt kanningararbeiði og kunnu tí lýsa Daniel sum eitt stórt menniskja, sum eisini hevði sínar veikleikar.

Sosialurin